Vikuskiftis Sosialurin



## Vencil vil hava tilfar

Triðja útgávan av tíðarritinum, Vencil, er nú ávegis. Freistin at lata inn tilfar til triðja Vencil er 01.08.07. Øll kunnu senda inn tilfar til Vencil. Einastu treytir eru, at tað er skaldskapur á føroyskum á bundnum ella óbundnum máli (íroknað ritroyndir (essays)) og at tað er væl og virðiliga arbeitt ígjøgnum og stórt sæð liðugt, áðrenn tað verður sent. Tey, sum senda tilfar inn til Vencil, skulu halda seg til røttu mannagongdina. Teksturin, sum verður sendur inn skal verða sendur teldutøkur á telduatsetrið: vencil@vencil.fo. Meira fæst at vita á slóðini, www. vencil.fo.



## Íverksetaranevndin skipað

Hóskvøldið í farnu viku helt nevndin fyri Íverksetarahúsið í Klaksvík sín fyrsta fund. Nevndin skipaði seg við Kitty May Ellefsen sum forkvinnu. Hinir limirnir í nevndini eru Eyðun Mørkøre, deildarleiðari hjá Eik og Torben Hendriksen, stjóri í Birc Estate í Herning, DK. Rani Nolsøe varð settur sum dagligur leiðari av Íverksetarahúsinum. Annars viðgjørdi nevndin á sínum fyrsta fundi reglugerðina fyri 'Grunnin Íverksetarahúsið', sum var tikin til eftirtektar. Eisini vórðu mál og visjuónir hjá Íverksetarahúsinum viðgjørd.

# Føroya sjey undurverk

**Sjónvarpið fer næstu tvær vikurnar saman við hyggjarunum at kjósa Føroya sjey undirverk**

UNDURVERK
*tíðindaskriv*

Hyggjararnir skulu í fyrsta lagi senda uppskot við eini mynd til sjónvarpið og týsmorgunin byrjar atkvøðugreiðslan.

Eitt undurverk í hesum høpi er eitt ávíst avmarkað stað, bygningur, minnismerki ella líknandi, har mannahond hevur verið uppi í leikinum. Sostatt eru vøkur náttúrustøð ikki við í hesi kapping, tí har hevur mannahond ikki verið við.

Kravið er eisini, at undirverkið skal vera okkurt, sum eygað kann síggja.

Uppskot til Føroya sjey undurverk skulu sendast til adressuna undurverk@kringvarp.fo og mynd skal sendast við.

Navnið á undurverkinum og hvar í landinum vit eru, skal sendast við. Ikki er neyðugt við nakrari frágreiðing. Men kravið er, at mynd verður send við. Heldur ikki er neyðugt at senda sjey uppskot inn. Tikið verður móti uppskotum til mánakvøldið 16. juli.

Sjálv atkvøðugreiðslan byrjar týsmorgunin 17. juli og endar á miðdegi hósdagin, 26. juli. kl. 9.00. Hvørji Føroya sjey undurverk eru, verður avdúkað í ólavsøkusendingini ólavsøkuaftan.

Uppskotini, sum koma inn, vera sum skjótast løgd á heimasíðuna www.kringvarp.fo/undurverk.



*Man múrurin í Kirkjubø ikki vera eitt gott boð, nú Føroya sjey undurverk skulu kjósast?*

# Gestir á enskum

**Vælumtóktu gestirnir vitja enska málið á teirra komandi útgávu, ið hevur fingið heiti 'Natural Life'**

TÓNLEIKUR
*Petur Háberg*
*petur@sosialurin.fo*

Á heimasíðuni Kjak.fo hava Gestir skrivað út eina kapping í samband við teirra komandi útgávu 'Natural Life':

- Meðan Gestir í løtuni eru í ferð við at gera nýtt tilfar liðugt til næstu fløguna, so tekur bólkurin væl ímóti tykkara hjálp!

- Øll hugskot um permur, bannarar, plakatir, osfr. verða tikin upp til eftirmetingar, og ein verður sjálvandi viðurkend/ur sum eigari - hepni vinnarin fær møguliga eisini bjóðað víðari samstarv og løn!

Víðari skrivar bólkurin:

- Viðkomandi upplýsingar eru, at næsta fløgan ber heitið "NATURAL LIFE", og at fyrsta stakfløgan, ið antin verður "I LOVE EVERYTHING ABOUT YOU" ella "CRASHING A PLANE INTO THE GROUND", verður útgivin 9. januar í næsta ári.



*Gestir geva fløgu út komandi ár*

## FAKTA

**Limir:**

**Ólavur Jákupsson:** sangur, gittari, ljómborð, piano
**Torfinnur Jákupsson:** gittari, piano, tekstir
**Jógvan Andreas á Brúnni:** trummur
**Niels Jákup í Jógvanstovu:** bass
**Knút H. Eysturstein:** hammond, piano, rhodes, annað ljómborð.

**Í løtuni:**

Skriva løg til komandi fløguna 'Natural Life', ið kemur út í 2008.

**Slóð:**

*http://www.myspace.com/gestir*